Meðan føroyingar keglast um, hvar útgerðarhavnin skal vera:

# Skotar bjóða Scrabster fram sum útgerðarhavn á Atlantsmótinum

*Meðan bygdir og býir í Føroyum í hvør sínum lagi stríðast um at gerast framtíðar útgerðarhavnin hjá eini møguligari komandi oljuvinnu, so tykjast skotar nú at leggja seg eftir at gera út Scrabster til komandi útgerðarhavnina hjá oljuvinnuni í tí nýggju oljuprovinsuni á Atlantsmótinum (Atlantic Frontier). Eisini føroyska økið er tikið við í kanningarnar, sum eru gjørdar um útbygging av havnini í Scrabster. Tíðindablaðið Sosialurin hevur fingið hendur á nýggjastu kanningunum, sum vit hava hugt nærri at.*

*Jan Müller*



Oddamenninir fyri Scrabster Harbour Trust vitjaðu í Føroyum í fjør. Teir leggja stóran dent á tann týdning, sum ein komandi oljuvinna á føroyskum øki kann fáa fyri Scrabster sum framtíðar útgerðarhavn fyri alla nýggju oljuprovinsuna millum Føroyar og Hetland.




Perman á kanningini, sum ráðgevandi fyritøkan MAI hevur gjørt fyri myndugleikarnar í Scrabster

Um somu tíð sum føroyingar - og tað vil siga bygdir og býir í Føroyum - kappast um at vera fyrst og best til at bjóða seg fram at veita eini komandi oljuvinnu ta bestu tænastuna við eitt nú útgerðarhavnum, hava skotar savnað øll síni bestu kort í eina kurv, og hon eitur Scrabster.

Kappingin um at vera útgerðarhavn hjá eini oljuvinnuni í nýggju oljuprovinsuni í Atlantshavinum er longu byrjað av álvara og tað tykist sum at skotar er mest ágrýtnir og úti um seg. Hetta er kanska heldur ikki so løgið, tá hugsað verður um, at fyrsta bretska oljuframleiðslan vestan fyri Hetland fer í gongd í næstum. Við stuðuli úr ES-grunnum, við teimum mongu roynd... og ikki minst pengunum hjá oljuvinnuni í øllum Bretlandi í rygginum umframt møguleika fígging úr London, bjóðar Scrabster seg nú fram sum besta útgerðarhavnin hjá eini framtíðar oljuvinnu í Atlantshavi tvs. í tí stóra og spennandi oljuøkinum, sum røkkur frá Hetlandi til Føroyar og annars suður eftir móti Rock All.

### Kappast við Aberdeen og Peterhead

Scrabster roynir við hesum at vinna á øðrum skotskum oljuhavnum so sum Aberdeen og Peterhead, sum hava ligið fremstar, tá talan var um at menna eina oljuvinnu í Norðsjónum.

Um fáar mánaðir sprýtur fyrsta oljan upp frá eini keldu vestan fyri Hetland upp og hervið er Atlantsoljuævintýrið byrjað. Norðsjóvaroljan hevur tá av álvara fingið ein kappingarneyta, og hann eitur Atlantshavsoljan ella bara Atlantsoljan.

### Veruligi kappingarneytin eru Føroyar

Og tað er hesum, sum teir, ið ráða fyri borgum í Scrabster, vilja gera sær dælt av. Sum so eru kappingarneytar teirra ikki Aberdeen ella Peterhead, um vit tosa um Skotland, men tað verða heldur Føroyar - í hvussu er uppá longri sikt - sum annars liggja næstar ríku oljukeldunum í hesi nýggju oljuprovinsini.

### Arbeiða miðvíst

Tað verður eisini arbeitt sera miðvíst frá skotskari síðu at gera Scrabster til eina komandi útgerðarhavn hjá oljuvinnuni vestan fyri Hetland.

Nú um dagarnar varð síðsta hond løgd á fyrireikingarnar til at gera hesar tankar til veruleika.

Sosialurin hevur fingið hendur á snotuligum frágreiðingum sum seta út í kortið, hvussu Scrabster skal fóta sær í oljuvinnuni og gerast kjarnin í einum framtíðar oljuævintýri í tí teir sjálvir kalla "The Atlantic Frontier" ella á føroyskum tí atlantiska útjaðarøkinum.

Har verður m.a. skrivað, at eydnuna finnur tú við at vera á tí rætta staðnum til røttu tíðina.

Víðari verður sagt frá, at nú tá alt peikar móti, at økið vestan fyri Hetland verður framtíðar oljuøkið og avloysarin hjá Norðsjónum, so ræður um at hava útgerðarhavnina so nær oljukeldunum sum tilber. Siglingartíðin er pengar verður skrivað og víst verður á, at serliga í hesum økinum er umráðandi at leggja væl til rættis, tí stóru dýpini, veðurlagið ... seta hørð krøv til bæði flogur og rakstur. Kann nakað vinnast aftur við at hava eina útgerðarhavn, sum liggur beint nær framleiðslustøðunum, hevur tað nógv at siga. Sammeta vit Scrabster og Aberdeen, so kann ein vinna helvtina av tíðini við at brúka Scrabster sum útgerðarhavn.

Tað er greitt, at skotar hava eygu og oyru opin fyri tí, sum hendir á føroyskum øki eisini. Og hetta fáa vit

➔



Tey stóru bassengini - lagdirnar - har nógv olja verður hildin at liggja goymd liggja bæði inni á bretskum og føroyskum øki. Teinurin úr Scrabster og úr Føroyum til komandi oljufeltini er í mongum førum tann sami.




Scrabster liggur rættiliga sentralt fyri, tá hugsað verður um økini, sum eru lutað út til oljufeløgini. Gráu økini vestan fyri eru nýggju blokkarnir, sum eru boðnir út í 17 umfarinum.

→

## 3000 arbeiðspláss uppá longri sikt

Roknað verður við umleið 3000 nýggjum arbeiðsplássum í Scrabster, Dounreay og har nærhendis.

Hesi mongu arbeiðsplássini fara at hava við sær økta inntøku til økið uppá fleiri milliardir krónur komandi árini.

Í frágreiðingini verður eisini grundgivið fyri, hví Scrabster er so vælegnað sum framtíðar útgerðarhavnin fyri Atlantshavið. M.a. finst helikoptaraflogvøllur í Wick. Hesin kann stytta munandi um flutningin av arbeiðsfólki til framleiðslupallarnar.

Eisini koma bygningar og verkstaðir í Dounreay væl við hjá útgerðarhavnini. Mett verður, at her eru góðir møguleikar at útbyggja við facilitetum, sum hava týdning fyri eina útgerðarhavn.

Í hesum samband verður eisini umhugsað at taka ímóti gomlum oljupallum, ið skulu takast sundur á landi.

## Føroyar tiknar við í metingarnar

Áhugavert er eisini at leggja til merkis, at Føroyar og føroyska økið verða nevnt viðgjørd í frágreiðingini. Roknað er m.a. út, hvussu stórt virksemi fer at vera á føroyskum øki komandi 25 árini heilt fram til ár 2020.

Her er sett upp í talvur, hvussu nógvar boringar verða komandi árini. Eisini er meting av, hvussu nógv olja kann goyma seg í Føroya-Hetlandslagdini (bassenginum), sum liggur báðumegin núverandi miðlinju.

Roknað verður við, at tað fara at verða boraðar einar 10 keldur um árið í minsta lagi komandi 25 árini.

Í frágreiðingini verður staðfest, at føroyska økið er tikið við í metingarnar.

"A substantial portion of the potential reserves lies in the Danish sector, governed by the Faeroes. Oil industry development is some 5 years behind the UKCS (United Kingdom Continental Shelf, bretski landgrunnurin. blaðm.) in this area, but future Faeroes procepects are included in this study".

Við øðrum orðum hava teir í hesi kanningini um Scrabster sum framtíðar útgerðarhavn í nýggju oljuprovinsuni teir kalla "The Atlantic Frontier" tikið við eina komandi oljuvinnu á føroyskum øki.

Áhugavert kundi verið at hoyrt metingar og viðmerkingar frá føroyskari síðu til hetta, nú stórur dentur tykist verða lagdur á at fáa í hvussu er eina útgerðarhavn í Føroyum.

Sammeta vit við føroysk viðurskifti, so er greitt, at teinurin úr Føroyum til oljufeltini er ikki longri enn hann til Scrabster og sohvørt oljuvinnan mennir seg longur norður og vestur eftir, tess styttri er teinurin til Føroya.

Afturat hesum kann so nevnast, at føroyingar eru munandi betri fyri hvat viðvíkur tænastu av ymsum slag eitt nú skipasmiðjum og verkstøðum. Eisini um hugsað verður um slíkt sum eitt nýtímans sjúkrahúsverk fyri bert at taka eitt dømi.

Hinumegin er tað ein stórur fyrimunur hjá Scrabster, at útgerð og útbúnaður til oljupallar o.l. hevur styttri at fara enn um hann skal til Føroya fyrst og síðani út aftur á oljufeltini.




Leiðin úr Scrabster á nýggju oljuleiðirnar vestan fyri Hetland, eitt nú Foinaven er bert helvtin av henni úr Aberdeen. Tað merkir styttri siglingartíð, minni oljunýtslu og harvið minni útreiðslur.


*Tíðindaskriv frá Føroya Skúlabókagrunni*

# »Renta og skattur«

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út heftið »Renta og skattur« eftir Mortan Dalsgarð og Edvard Olsen. Heftið er evnishefti til »Skygni støddfrøði 9«. Roknihátturin er í høvuðsheitum prosentrokning í samfelagsligum høpi. Evnini, sum viðgjørd verða, eru renta og skattur. Aftast í heftinum er svarlisti.

Myndir og tekningar eru eftir Olivur við Neyst. Hestprent hevur sett og brotið um, og Einars Prent hevur prentað.

Heftið er 40 síður í A4 støddd og fæst fyri 36 krónur.




# Amnesty International

Upplýsingartíðirnar hjá Amnesty International, Føroya Deild eru: Týsdag, hósdag og fríggjadag frá kl. 13 til kl. 17. Tlf. 15816.